LØGTINGIÐ

Til allar tingmenn og
Umsiting tingsins

Formansskapurin

**12. mars 2020**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi vandanum fyri Covid-19 smittu (Coronavirus)**

Formansskapurin í Løgtinginum hevur í gjár og í dag viðgjørt støðuna hjá Løgtinginum; bæði arbeiðið her í mun til vandan fyri Covid-19 smittu, hvussu vit best verja Løgtingið í hesum sambandi, og hvussu vit kunnu vera við til at minka um vandan fyri at bera smittu í samfelagnum annars.

Formansskapurin hevur gjørt av, at Løgtingið **fyribils** skal seta í verk nøkur tiltøk í hesum sambandi:

- Løgtingsfundir og nevndarfundir verða fyribils ikki hildnir, uttan at serligur tørvur er á hesum. Tingmenn hava tó skyldu at vera tøkir, um tørvur verður á at halda fund.
- Løgtingið tekur fyribils ikki móti vitjandi í Løgtinginum. Hetta forboð er bæði galdandi fyri umsitingina og tingmenn, sum vanliga koma higar við gestum.
- Løgtingið setir fyribils forboð fyri øllum ferðum uttanlands vegna Løgtingið, bæði galdandi fyri tingmenn og umsitingina.
- Í sambandi við møguligar komandi tingfundir og nevndarfundir verður einans atgongd fyri fólk, sum koma higar í persónligum arbeiðsørindum.
- Heitt verður á tingmenn og umsitingina um at ansa sær í øllum viðurskiftum og ikki at útseta seg fyri størri vanda enn neyðugt fyri at verða smittað. Hetta merkir m.a., at heitt verður á hesi um at halda seg burtur frá størri tiltøkum og annars at nýta vit og skil í øllum viðurskiftum.

Um so er, at fólk hava illgruna um, at tey kunnu verða blivin smittað við Covid-19, verða tey biðin um at halda seg burtur frá tinginum, og at venda sær til lækna at fáa hetta avsannað, áðrenn tey aftur koma í Løgtingið.

Formansskapurin fylgir støðuni og vendir aftur við nærri boðum, tá hesi forboð v.m. verða broytt.

Á Løgtingi, 12. mars 2020

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

LOGTING.FO

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901